Fróðskaparsetur Føroya

5. november 2004

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 12/2004

Tíð: Hósdagin 4. november 2004, kl. 13.00-15.00

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Malan Marnersdóttir, rektari
Jóan Pauli Joensen, vararektari, fráfarandi megindeildarráðsf. fyri SSD
Elin Súsanna Jacobsen, nývaldur megindeildarráðsf. fyri SSD
Turið Sigurðardóttir, fráfarandi megindeildarráðsf. fyri FMD
Eivind Weyhe, nývaldur megindeildarráðsf. fyri FMD
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Annika Sølvará, setursskrivari

Malan byrjaði fundin við at ynskja nýggju setursráðslimunum vælkomnum og at takka fráfarandi limunum fyri gott samstarv.

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 11/2004 setursráðsfundi 4. oktober 2004.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarkarmur 2004 aftaná áheitan frá Mentamálaráðnum um niðurskurð uppá 200.000 kr.** (J.nr. 0015-01111). Staðfesting av nýggjum býti eftir eyka setursráðsfundin 27. oktober. Býtið varð sent deildunum beint eftir fundin.

4. **Námsskipan fyri M.A. í mentanarvísindum.** (J.nr. 0042-01380). *Fundarskjal: Uppskot frá Søgu- og samfelagsdeildini, dagfest 4.10.04, 3 s.* Ymsar rættingar skotnar upp. AS sendir eitt rættað uppskot til deildina at góðkenna, verður síðani staðfest millum funda.

5. **Lestur á Fróðskaparsetrinum 2005/06.** (J.nr. 0040-01352). Ongar regluligar upptøkur vera í 2005, í 2006 verða harafturímóti upptøkur á øllum deildum. Møguliga

verða studentar tiknir inn til Opið Setur í KT-frøði. Hetta er ein fíggjarspurningur og ein spurningur um arbeiðsorku. Náttúruvísindadeildin arbeiðir við málinum.

6. **Samstarv við Universitetið í Cosenza og Akademi LALEO í San Severina.** (J.nr. 0012-01406). Rektarin hevur undirskrivað tvær samstarvsavtalur á ferðini í Italia. Hon greiddi frá ferðini og vísti fram gávurnar, sum hon fekk til Fróðskaparsetrið. Hevur vegna Fróðskaparsetrið sent ymiskt tilfar til Italia eftir heimkomuna.

7. **Innbjóðing frá Altjóða Skrivstovuni at luttaka á útbúgvingarráðstevnuni "Markleys Útbúgving 2005", sum verður á Kambsdali 26.1.05 og í Hoydølum 27.1.05.** (J.nr. 0056-01478). Samtykt at verða við til ráðstevnuna. SSS ger kunningartilfar í samráð við deildirnar og samskipar luttøkuna á ráðstevnuni.

8. **Uppskot frá Fróðskaparfelagnum um stovnseting av vísinda-/universitetsforlagi.** (J.nr. 0092-01121). *Fundarskjal: Brævfrá Fróðskaparfelagnum, dagfest 28.10.04, 1 s.* Setursráðið tók av fullum huga undir við uppskotinum. Setrið vil veita allan neyðugan praktiskan stuðul til at skipa forlagið og eisini átaka sær fyrisitingina mótvegis gjaldi eftir nærri avtalu við forlagið. Setursskrivstovan svarar Fróðskaparfelagnum.

9. **Samstarvið við Landsbókasavnið um vísindaligar leitigrunnar og e-tíðarrit. Støðutakan til at tekna hald uppá TDNet.** (J.nr. 0013-01226). Setrið teknar seg fyri hendan partin eisini. Setursskrivstovan boðar Landsbókasavninum frá.

10. **Fyrispurningur frá Altjóða Skrivstovuni, um summarskeiðið fyri útlendingar verður endurtikið í 2005.** (J.nr. 0040-01485). Føroyamálsdeildin hevur gjørt av at skipa fyri skeiði aftur komandi á í august. Hesuferð verður denturin lagdur á mál, meðan onnur fak kunnu koma inn sum fyrilestrar. Semja um at hetta er eitt frálíkt tiltak fyri Fróðskaparsetrið, sum aðrar deildir áttu at gjørt nakað við eisini.

11. **Uppskot um viðtøkur fyri Fróðskaparsetur Føroya sum sjálvsognarstovnur.** (J.nr. 0015-00003). *Fundarskjal: Bræv og uppskot frá Niels Winther Poulsen, dagfest 2.11.04, 5 s.* Uppskotið umrøtt. Semja um at hava viðtøkurnar so einfaldar sum gjørligt. Setursskrivarin arbeiðir víðari við málinum.

12. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
    a. **Fundir á Náttúruvísindadeildini 19.10.04 og 2.11.04.** (J.nr. 0011-00013). Einki at leggja afturat.
    b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 26.10.04.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.
    c. **Fundir á Føroyamálsdeildini 28.10.04 og 29.10.04.** (J.nr. 0011-00011). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

13. **Úrslit av valinum til megindeildarráðini 5. oktober 2004 og rektaravalinum 2. november 2004 at staðfesta.** (J.nr. 0011-01379).

**Megindeildarráðið á Føroyamálsdeildini: Eivind Weyhe, Turið Sigurðardóttir og Anfinnur Johansen vegna vísindastarvsfólkini (Zakaris S. Hansen tiltakslimur), Rannveig Winther vegna fyrisitingarstarvsfólkini (Lena Reinert tiltakslimur), Mortan Ó. Vang og Rógvi L. Svøðstein vegna studentarnar (Haldis Lützen tiltakslimur).**
**Megindeildarráðið á Søgu- og Samfelagsdeildini: Elin Súsanna Jacobsen, Jóan Pauli Joensen og Andras Mortensen vegna vísindastarvsfólkini (Jógvan Mørkøre tiltakslimur), Eileen Vang sum fyrisitingarstarvsfólk, Jógvan Jacobsen vegna studentarnar – aftaná valið hevur Dávid í Lág játtað at vera annað studentaumboðið.**
**Megindeildarráðið á Náttúruvísindadeildini: Anna Maria Fosaa, Eyðfinn Magnussen og Hans Pauli Joensen vegna vísindastarvsfólkini, Marjuni í Túni Mortensen vegna fyrisitingarstarvsfólkini, Fríðrik Heinesen og Høgni Vesturklett vegna studentarnar (Jaspur Guttesen tiltakslimur).**
**Nýggju megindeildarráðini taka við 1. november 2004 og sita í 3 ár burtursæð frá studentaumboðunum, tey verða vald hvørt ár.**

**Úrslitið av rektaravalinum gjørdist, at Jóan Pauli Joensen, professari, varð valdur við friðarvali. Rektarin tekur við 1. desember 2004 og situr í 3 ár.**
Úrslitið staðfest.

14. **Próvdómaragóðkenning. Eftir tilmæli frá Náttúruvísindadeildini hevur Mentamálaráðið góðkent Bo Johansen, Ph.D., lektara við Botanisk Institut á Københavns Universitet sum próvdómara í *Plantubygnaði og navnagreining*. At staðfesta.** (J.nr. 0026-00781). Staðfest.

15. **Góðskrivingar. Søgu- og Samfelagsdeildin mælir til, at Anna P.L. Olsen fær hesi skeið frá B.S.Sc.-próvnum góðskrivað í søgulestrinum:**

    a. ***Grundskeið í stjórnmálafrøði 7,5 ECTS*, *Grundskeið í sosiologi 7,5 ECTS*, *Grundskeið í búskaparfrøði 7,5 ECTS* og *Hagfrøði við kunningartøkni 7,5 ECTS* fyri *Samfelagsvísindaligt evnisøki 25 ECTS* við próvtalinum Staðið.**
    b. ***Evnisøki 2: Yngra søgan 30 ECTS* fyri sama skeiðið við próvtalinum 10.**
    (J.nr. 0046-01069).
    Góðkent.

**Kunningarmál:**

16. **Uppgáva "Coursework for Faroese Module of M.A. in West Norse and Medieval Studies" hjá Marie-Nathalie Lecordier, London. Hon fekk námsferðarstuðul í ár.** (J.nr. 0071-01126).

17. **Føroya Umhvørvi í tølum 2003, Heilsufrøðiliga Starvsstovan.**

**18. Aarhus Universitet i ord og billeder 2003, donsk og ensk útgáva.**

**19. Beretning 2004, Rigsombudsmanden på Færøerne.**

**20. De 12 danske universiteter, faldari frá Rektorkollegiet.**

**21. Call the Heart, Act of Peace and Equality. Reiko Uchida Publications, Kanagawa-ken, Japan.**

**22. Ráðstevna 7.-8.4.05 í Stockholm "Filosofi med barn och ungdomar", Lärarhögskolan i Stockholm.** (J.nr. 0057-00155).

**23. Høgskolen i Stavanger fingið universitetsstatus frá 1. januar 2005. Rektarin ynskir vegna Fróðskaparsetrið tillukku við formligum skrivi við gávu.**

At enda takkaði Malan fyri seg í setursráðnum, tí hetta var seinasti fundur hjá henni sum rektari á hesum sinni.

Frágreiðing: Annika Sølvará